G!

LEYGARDAGIN BJÓÐA VIT:

Á SANDINUM:
BARNAKONSERT, GESTIR, ENEKK, ÚLPA (IS) SUPER ROKKARAR
VERÐINSNAVNIÐ: BOMFUNK MC'S[FI]
CLICKHAZE: FÖROYA BESTU LIVE
VIÐ FÖROYA BESTU SANGARINNU
KÓRSANG, FELAGSSANG, RÖÐA, BÁL, FÝRVERK OG FÖROYSKUR DANSUR

Á SPÆLIPLÁSSINUM:
ANGELA, PÄR SÖRMAN, PETE & BRIAN, ØSSUR & HJALTI, NEWTIME BAND. HANUS – NÝTIST OKKUM SIGA MEIR...

Í ÍTRÓTTARHØLLINI:
ALL THAT RAIN, SPARKA REYV
4 ÚTLENDSKIR DJ´AR

Í MENTANARHÚSINUM:
BRIM – BEATLES FYRI ALLAR PENGARNAR

B ATGONGUMERKI Á 350 KR GEVUR ATGONGD TIL ALLAR KONSERTIR Á SANDINUM OG SPÆLIPLÁSSINUM FRÍGGJADAG OG LEYGARDAG

A ATGONGUMERKI Á 485 KR GEVUR ATGONGD TIL ALLAR KONSERTIR OG TILTØK Á 5 PALLUM HÓSDAG FRÍGGJADAG OG LEYGARDAG, TÓ ER 18 ÁRA ALDURSMARK TIL TILTØKINI Í MENTANARHÚSINUM

Sosialurin
Sosialurin
i

UTTAN ÚR HEIMI

# Drápsmenn fjala seg í Noregi

**Interpol heldur, at tveir menn, sum myrdu serbiska forsætisráðharran Zoran Djindjic tann 12. mars, fjala seg í Noregi**

MORÐ
*Árni Joensen*

Grækarismessudag varð serbiski forsætisráðharrin, Zoran Djindjic, myrdur uttan fyri stjórnarhúsini í Beograd. Síðani hava serbisku myndugleikarnir leita eftir drápsmonnunum, men nú er komið fram, at menninir eftir øllum at døma fjala seg í Noregi.

Norska løgreglan váttar, at hon hevur fingið at vita frá Interpol, at tann 28 ára gamli Milan Jursic og tann 26 ára gamli Vladimir Milisavljevic eftir øllum at døma fjala seg einastaðni í Suðurnoregi, men at teir nýta ikki hesi nøvnini longur.

Serbiska løgreglan skal hava boðað Interpol frá, at tað helst vóru teir báðir menninir, sum skutu Zoran Djindjic. Sambært løgregluni hava teir verið virknir limir í einum herviligum brotsmannaliði í Beograd. Hetta sama brotsmannaliðið er eisini lagt undir at hava myrt fyrrverandi serbiska forsetan Ican Stambolic umframt eini 50 onnur fólk. Liðið er eisini lagt undir fleiri burturflytingar.

## Læknatrot nógv ár afturat

Í løtuni eru umleið 800 læknastørv í danska sjúkrahúsverkinum ikki sett. Talan er serliga um serlæknastørv, og sambært heilsustýrinum fara eini fimtan ár at ganga, áðrenn serlæknatrotið verður nøktað.

Heilsustýrið sigur, at tað leggur dent á at útbúgva so nógvar serlæknar, sum til ber, men trupulleikin er, at tað framvegis eru alt ov fáir læknar, sum fáa sær serútbúgving. Ein uppgerð fyri tveimum mánaðum síðani vísti, at læknatalið í Danmark veksur, men at serlæknatrotið framvegis er stórt.

Framrokningar vísa kortini, at tey næstu árini koma nógvir nýlærdir læknar av teimum lærdu háskúlunum, men tað fer kortini at taka rúma tíð, áðrenn hetta fer at síggjast aftur á serlæknaøkinum. Sambært danska læknafelagnum kann tað taka einum lækna upp í fjúrtan ár at gera seg lidnan við eina serlæknaútbúgving. Ætlanin er nú at royna at fáa tíðina stytta, skrivar Politiken.

## Betri djóravernd

Tey norðurevropeisku ES-londini og tey suðurevropeisku hava ikki somu uppfatan av hugtakinum djóravernd, men nú hevur ES sett sær fyri at skera ígjøgnum.

Í teimum norðaru limalondunum hava umhvørvisfólk og myndugleikar ofta funnist at viðurskiftunum hjá djórum, sum verða flutt millum londini, og skelkandi sjónvarpsmyndir hava øst bæði djóravinir og politikarar. Eitt nú hava fjølmiðlar avdúkað, at ross noyðast at standa uppi í einum lastbili í næstan 20 tímar, tá tey verða flutt til sláturhús.

Forbrúkarakommiserurin hjá ES, David Byrne, sigur, at nú skulu reglurnar herðast, tí øll djór skulu fáa eina virðiliga viðferð, sigur hann. Eitt nú ætlar hann, at í framtíðini skal eingin djóraflutningur vara meiri enn átta tímar. Tey norðaru limalondini taka undir við hesum, men tey syðru og Írland eru ímóti. Djóraverndarfelagsskapir halda, at átta tímar er framvegis ov nógv.

## Mælir til altjóða AIDS-skatt

Franski forsetin, Jacques Chirac, heldur, at ein skipan við einum altjóða heilsuskatti hevði kunnað sett ferð á arbeiðið at útrudda sjúkur sum eyðkvæmi, tuberklar og malaria.

- Tað er neyðugt at finna nýggjar fíggingarmøguleikar, og eg rokni við, at vit sum frá líður fara at síggja, at ein altjóða heilsuskattaskipan er tann einasta loysnin, sigur franski forsetin.

Jacques Chirac kom við sínum uppskoti, tá hann endaði eina AIDS-ráðstevnu, sum hevur verið í París hesa vikuna.

## Mars nærkast Jørðini

Amerikanska rúmdarumsitingin NASA sigur, at tann 23. august verður gongustjørnan Mars so nær Jørðini, sum hon ikki hevur verið tey seinastu nógvu túsund árini.

Útrokningar hjá NASA hava víst, at seinast Mars var so nær Jørðini, var í árinum 57537 fyri Kristi føðing. Tað var í september tað árið, eru vísindafólkini eisini komin eftir.

Tey, sum hava hug at síggja Mars so nær Jørðini, eiga at taka møguleikan, tá hann býðst í august, tí sambært amerikansku vísindafólkunum hendir tað ikki aftur fyrr enn í árinum 2287.

Tað verður eisini í august.



UTTAN ÚR HEIMI

# Bretar vilja hava fangar úr Guantanamo



*Tony Blair hevur havt nóg mikið við at verja seg í seinastuni í samband við kríggið í Irak. Her verjir hann seg í undirhúsinum*

*Mynd. Reuters*

**Bretskir politikarar halda, at USA eigur at lata Bretlandi samsýning fyri luttøkuna í krígnum í Irak. Eitt hóskandi krav er at fáa bretskar ríkisborgarar í Guantanamo-leguni leysar**

KRÍGSFANGAR
*Árni Joensen*

Fyrst í mánaðinum kunngjørdi amerikanska stjórnin, at seks av teimum næstan 600 fangunum, sum sita í fangaleguni á herstøðini Guantanamo á Kuba, koma fyri ein hernaðardómstól í næstum. Stutt eftir frættist, at tveir av teimum seks eru bretskir ríkisborgarar, og tað hevur elvt til dúgligt kjak í Bretlandi.

Meiri enn 200 limir í Parlamentinum, teir flestu úr Labour-flokkinum hjá Tony Blair, forsætisráðharra, hava kravt, at USA skal útflýggja allar teir fangarnar í Guantanamo, sum eru bretskir ríkisborgarar. Politikararnir siga, at fangarnir, sum koma fyri ein hernaðardómstól, fáa ikki eina rættvísa viðferð.

Ein av bretsku ríkisborgarunum, sum er fangi í Guantanamo, er tann 23 ára gamli Fenoz Abbasi. Hann er føddur í Uganda, men flutti til Bretlands sum átta ára gamal. Í desember í 2000 fór hann til Afghanistan, har amerikanararnir seinni tóku hann og fluttu hann til Guantanamo.

Ein annar er tann 35 ára gamli Moazzam Begg. Hann hevur búð í Birmingham og fór til Afghanistan í 2001. Í januar í fjør varð hann tikin í Pakistan. Hann hevur konu og fimm børn í Onglandi.

Tað eru Abbas og Begg, sum amerikanarar nú ætla at draga fyri ein hernaðardómstól saman við einum avstralskum ríkisborgara og trimum øðrum fangum. Teir eru skuldsettir fyri at hava havt samband við yvirgangsfelagsskapin al-Qaeda.

Nú vilja bretsku politikararnir hava Blair at krevja bretsku ríkisborgararnar útflýggjaðar, men Blair hevur tann trupulleika, at hann kann ikki veita amerikanarum vissu fyri, at menninir koma fyri rættin í Bretlandi. Bretskir fjølmiðlar hava seinastu dagarnar víst á, at stjórnin kann ikki áleggja ákæruvaldinum at draga menninar fyri rættin. Harafturat er tað minni enn so vist, at upplýsingar hjá amerikansku fregnartænastuni eru nóg mikið til at reisa sak ímóti monnunum, skriva bløðini.



